# FÁ TÆR LONGRI HÁR HJÁ FRISØRINUM

Salong BRONX
Lissi Mouritsen







Tað er blivið alt meira vanligt at leingja sær hárið. Nú fara fólk ikki bara til frisør, tá ið tey skulu klippast ella snøggast, nei, nú er eisini møguleiki at leingja sær hárið.

Salong BRONX í Tórshavn sveisar hár fyri fólk.

Tað tekur ikki langa tíð at fáa langt hár í BRONX – einans tveir til tríggjar tímar, og tá er frisúran eisini uppá pláss.

Tað ber til at velja, hvat slag av hári tú vilt hava – fipurhár ella ordiligt hár.

Fipurhárið er bíligari, og tað fæst í øllum hugsandi og óhugsandi litum. Tað tolir ikki so nógvan hita, og tí skulu fólk ansa eftir hitanum, tá ið tey føna sær.

Tað »ordiliga« hárið er í eisini í øllum natúrligum litum, men fyrimunurin við hesum hári er, at tað kann bæði litast og strípar, fønast, slættast og krúllast – tað er júst sum at eiga hárið sjálvur.

Hárið sum er sveisa ella líma upp í, kann varða upp til tríggjar mánaðir. Hárið er límað í, og fyri at límið ikki skal fara inn í títt veruliga hár, skal tað takast burtur inn tríggjar mánaðir. Tað verður eisini gjørt hjá hárfríðkuni.

Tað ber til at keypa lokkar einkultvís, ella um man skal hava nógv hár, so keypur man ein bana. Tað er nakað bíligari.





Kostnaður:
1 lokkur av fiburhári: 50 kr
1 lokkur av orduligum hári: 55 kr



- Fer ikki illa við hárinum
- Er nemt at halda.
- Nýt nógv balsam.
- Lokkarnir kunna endurnýtast !

